## Owen skoraði í comeback-dysti



Enska stjørnan Michael Owen skoraði, tá hann fekk comeback fyri Newcastle í einum venjingardysti móti Gretna, sum dagliga spælir í skotsku 1. deild.

Michael Owen hevur verið skaddur síðani HM-endaspælið í fjørsummar, men nú sær av álvara út til, at kviki áleyparin er við at koma seg. Dysturin móti Gretna vóru hansara fyrstu minuttir á vøllinum síðani skaðan, men tað er líkt til, at maðurin framvegis veit hvar málið stendur. Hetta eru gleðiboð hjá venjaranum Glen Roeder, sum 22. apríl tekur ímóti meistarunum Chelsea.

## Dómari tosaði í telefon undir dysti

Danska blaðið BT avdúkar í dag, at boksidómarin Søren Saugmann tosaði í telefon undir dystinum millum Rudy Markussen og Sergej Tatevosjan.

BT staðfestir, at uppgávan hjá dómaranum er at kjósa vinnaran av dystinum, og hetta verður gjørt út frá hvussu ofta hvør hevur rakt hvønn, hvussu teir hava vart seg og so framvegis.

– En opgave, der må besværliggøres, hvis man samtidig taler i mobiltelefon, skrivar blaðið speiskliga.

Forsetin fyri danska boksisambandið, Jesper D. Jensen, sigur, at hann hevur sæð avdúkandi myndirnar og tosað við Søren Saugmann um hetta og sagt, at slíkt vilja teir ikki hava.

# Søgulig eyðmýking á Old Trafford

**Áðrenn týskvøldið 10. apríl 2007 hevði Roma ongantíð latið meiri enn fýra mál ígjøgnum í einum evropeiskum dysti, men eftir dystin á Old Trafford í gjárkvøldið er veruleikin ein annar. Manchester United sendi Roma út í kuldan við einari søguligari eyðmýking**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Undan 1/8 partsfinaludystinum í Champions League í gjárkvøldið hevði stóra stjørnan hjá Roma, Francesco Totti, sagt, at hann metti dystin á Old Trafford vera týdningarmiklari enn sjálv HM-finalan, hann var við at vinna í fjør.

Manchester United hevur ongan sitandi heimsmeistara á liðnum, men teir sóu eisini týdningin av dystinum. Kanska betur enn Francesto Totti og restin av Romaliðnum, sum snøgt sagt var avhølvað á Old Trafford.

7-1 gjørdist endaliga úrslitið. Christiano Ronaldo og Michael Carrick gjørdu tvey



*Michael Carrick skoraði sítt fyrsta og næsta mál í altjóða fótbólti í stórsigrinum hjá Manchester United í gjárkvøldið*

*Mynd: Polfoto*

mál hvør og Alan Smith, Wayne Rooney og Patrice Evra skutu hvør sítt. Einsamalla málið hjá italiumonnum gjørdi Daniele de Rossi.

Eyðmýkjandi stórtapið fyri onglendingum svíður í Rom og í fótbóltsitalia sum heild, men í allari neyðini kunnu Roma-fjepparar ugga seg við, at største italska tapið í evropeiskum fótbólti eigur Juventus, tá teir í 1958 taptu 7-0 móti Wiener í steypakappingini fyri meistaralið.

### Chelsea basti Valencia

Manchester United var ikki einasta enska liðið, sum fór víðari til hálvfinalurnar í Champions League í gjárkvøldið. Á útivølli á Mestella Stadion basti Chelsea Valencia 2-1, eftir at teir vóru aftanfyri í steðginum.

Chelsea var betra liðið og hevði bóltin meiri allan fyrra hálvleik, men hetta legði Fernando Morientes líka í, tá hann legði Valencia á odda, tá ein hálvur tími var spældur.

Helst hevur Mourinho givið sínum monnum nøkur borgarlig orð í steðginum, tí bara sjey minuttir inn í seinna hálvleik hevði Chelsea javnað. Shevchenko var málskjúttin og Essin átti uppleggið.

Chelsea trýstið tað, teir vóru mentir, men Valenciamálverjin Santiago Canizares stórbjargaði fleiri ferðir. Sostatt sá tað út til, at liðini skuldu út í umdyst. Men í yvirtíðini eydnaðist tað Essien at fáa bóltin framvið Canizares og í málið.

Soleiðis gekk tað fyri seg, tá Chelsea sendi Valencia út í kuldan og saman við United fór víðari til hálvfinalurnar í Champions League.

### Rein ensk hálvfinala

Í kvøld fæst so at vita, um tað verður ein rein ensk uppgerð í aðrari hálvfinaluni, tí Liverpool vann 3-0 á útivølli móti PSV og tekur ímóti hollendingunum á Anfield Road.

Hin dysturin í kvøld er ímillum AC Milan og Bayern Munchen. Har er framvegis alt opið, tí fyrri dysturin í Milan endaði við javnleiki 2-2.

# FM í amboðsfimleiki um vikuskiftið

**Føroyameistarakappingin í amboðsfimleiki fyri yngru fimleikararnar, verður í Ítróttarhøllini á Hálsi um vikuskiftið**

FIMLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Ítróttarhøllin á Hálsi í Havn verður komandi vikuskifti karmur um føroyameistarakapping og amboðsfinalur í amboðsfimleiki, sum Føroya Fimleikasamband skipar fyri saman við Havnar Fimleikafelag og Ljósinum.

Leygardagin 14. apríl verður føroyameistarakapping í amboðsfimleiki fyri pinkur, gentur, piltar og dreingir. Kappingin verður í ítróttarhøllini á Hálsi og byrjar kl. 13:00.

Sunnudagin verða amboðsfinalurnar, har føroyameistarar verða funnir í hvørjum amboði fyri seg. Kappingin sunnudagin byrjar kl. 15:00.

Fimleikararnir fara báðar dagarnar at kappast á gólvinum og í lopi. Harafturat kappast pinkurnar og genturnar á bitanum, og piltarnir og dreingirnir kappast í ringunum.

